-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,0 AUTOMAT.
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 179.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA
Skrás.: 20-09-95
Km.: 72.000
Prísur: 85.600,- Garanti*
Sýnaður 06-99

TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL L/B
Skrás.: 13-01-99
Km.: 28.000
Prísur: 165.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 52.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 30-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 167.600,- Garanti**

TOYOTA YARIS 1,0 TERRA
Skrás.: 21-04-99
Km.: 26.000
Prísur: 112.600,- Garanti**

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear
Skrás.: 13-06-96
Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-
Sýnaður 06-99

TOYOTA CARINA E 1,6 CDX
Skrás.: 16-10-96
Km.: 39.000
Prísur: 117.600,- Garanti*
Sýnaður 01-00

HONDA ACCORD 1,8
Skrás.: 01-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 148.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,8 L/B
Skrás.: 30-12-93
Km.: 140.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

HONDA CIVIC 1,4
Skrás.: 07-04-97
Km.: 52.000
Prísur: 107.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN
Skrás.: 30-05-94
Km.: 107.000
Prísur: 98.600,- Garanti*
Sýnaður 03-00

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 13-12-95
Km.: 87.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli
Skrás.: 02-07-90
Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-
Sýnaður 03-00

FORD ESCORT 1,6 STATION
Skrás.: 30-05-96
Km.: 37.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90
Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

FORD ESCORT 1,8
Skrás.: 21-08-95
Km.: 81.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 Xli
Skrás.: 11-06-91
Km.: 108.000
Prísur: 48.600,-
Sýnaður 09-00

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96
Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 Xli SEDAN
Skrás.: 01-03-96
Km.: 65.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 26-01-96
Km.: 115.000
Prísur: 65.600,-

TOYOTA COROLLA 1,6 Aut.gear
Skrás.: 09-08-95
Km.: 60.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 27-07-93
Km.: 115.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 128.600,- Garanti**

KIA SEPHIA 1,5
Skrás.: 17-04-97
Km.: 59.000
Prísur: 62.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA
Skrás.: 01-05-95
Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti*
Sýnaður 12-99

SUZUKI BALLENI 1,6 GLX
Skrás.: 26-06-96
Km.: 52.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

AVHEINTINGARTILBOÐ

TOYOTA CAMRY 1,8 XL
Skrás.: 30-06-88
Km.: 240.000
Prísur: 15.600,-
Sýnaður 04-99

VØRUVOGNAR

TOYOTA HIACH 2,4 DIESEL VAN
Skrás.: 26-05-98
Km.: 30.000
Prísur: 155.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 DS
Skrás.: 09-06-87
Km.: 221.000
Prísur: 15.600,-
Sýnaður 05-00

TOYOTA HIACH 2,4 D. V/ SÍÐURÚTUM
Skrás.: 08-09-98
Km.: 55.000
Prísur: 155.600,-

NISSAN BLUEBIRD
Skrás.: 12-06-87
Km.: 157.000
Prísur: 17.600,-
Sýnaður 08-00

TOYOTA LANDCRUISER 4,0 TURBO
Skrás.: 20-10-88
Km.: 159.000
Prísur: 99.600,-

NISSAN BLUEBIRD
Skrás.: 26-03-86
Km.: 192.000
Prísur: 2.000,-

TOYOTA DYNA 150 V/ LAST
Skrás.: 24-02-97
Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

OPEL ASCONA 1,6
Skrás.: 01-01-87
Km.:
Prísur: 3.600,-

TOYOTA LANDCRUISER 2,4 DIESEL
Skrás.: 05-11-86
Km.: 230.000
Prísur: 48.600,-

VW TRANSPORTER V/ DUP. KABINU
Skrás.: 17-02-87
Km.: 190.000
Prísur: 18.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Km.:
Prísur: 39.600,-

FORD SIERRA 1,8 DIESEL
Skrás.: 08-07-93
Km.: 100.000
Prísur: 15.000,-
Motorur í ólagi

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B V/ SKADA
Skrás.: 22-09-92
Km.: 90.000
Prísur: 18.000,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

Støkkið inn á gólvið!

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820

Donsk kvinna sýnir fram føroyskan bindihátt

Vivian Høxbro er kvinnan aftanfyri framsýningina. Troyggjur, sum Vivian hevur bundið, hanga á vegginum. Tær eru ikki til sølu, men hon selir sniðini og uppskriftirnar at binda eftir

STEFAN Í SKORINI

Vivian Høxbro í einum bundnaturriklæði við síðuna av einum av hennara troyggjum, sum verða at síggja á framsýningini Mynd: Jens Kr. Vang

Vivian bindir á eina serliga hátt. Hon nýtir mest domino háttin, har man bindir element saman til troyggjur ella onnur pløgg. Tað kunnu verða fýrakantar ella strimlar, sum verða nýttir at skapa eitt plagg

Hetta er ein háttur, Vivian hevur lært í Týsklandi. Hon sigur tó, at hann hevur verið nýttur í Føroyum í nógv Harrans ár, og henni lysti at vita, hvussu leingi hesin háttur hevur verið nýttur í Føroyum. Vivian hevur fingið at vita frá eini amerikanskari kvinnu, sum er kend innan bindiheimin, at hesin háttur hevur verið nýttur í Føroyum. Eisini arbeiðir Vivian nógv við skuggabinding, sum ger, at troyggjan broytir útsjónd, alt eftir hvaðani troyggjan verður skoðað.

Vivian hevur júst givið eina norska bók út við bindimynstrum og uppskriftum, og hon arbeiðir við at geva eina út á japanskum.

Framsýningin verður fríggjadag og leygardag frá klokkan 15 til 18. Eisini hevur hon skeið fríggjakvøld frá klokkan 19-22 og eitt longri skeið leygardagin frá klokkan 10-15.30. Til ber at tekna seg í Fandango.

Tey lesandi fáa 9 milliónir afturat

Høvuðsorsøkin til hækkanina er, at ferðastuðul innanoyggja til lesandi er innførdur, men hann telur bara ein lítlan helming av hækkanini

STEFAN Í SKORINI

Játtanin til lestrarstuðul á fíggjarlógini fyri næsta ár er 63 milliónir krónur. Játtanin á seinastu fíggjarlóg var 54 milliónir, og er hetta ein vøkstur á 9 milliónir.

Fýra orsøkir eru til vøkstin. Høvuðsorsøkin er, at ferðastuðul til lesandi er innførdur. Hetta er bara galdandi ferðing innanoyggja. Tey lesandi fáa eina upphædd til at gjalda fyri ferðing umframt tann vanliga stuðulin. Fyrr hava tey lesandi goldið fyri flutningin av tí vanliga lestrarstuðlinum. 4 milliónir eru settar av til ferðastuðulin innanoyggja.

Ferðastuðulin er ikki aldurstreytaður, men øll, sum nýta Strandfaraskip Landsins at koma í og úr skúla, fáa ferðastuðul. Fyri 20 túrar aftur og fram skal næmingurin gjalda 100 krónur. Næmingurin fær eitt elektroniskt kort, sum hann bara kann nýta á eini farleið til at koma aftur og fram einaferð.

Fyri fystur ferð verður lestrarstuðulin prístalsviðgjørdur. Prístalið er hækkað við 5,1%, og tað hevur við sær, at játtanin hækkar við 2,7 milliónum.

Aðrar orsøkir eru, at fleiri leita sær útum Norðurlond at lesa, og tað kostar landskassanum 1 million eyka. Eisini verður roknað við einum vøkstri í ferðastuðlinum til lesandi uttanlands, sum verður mettur at vera 1,5 milliónir.

Liberaliseringar á fjarskiftisøkinum

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, hevur gjørt av, at víðka liberaliseringina á fjarskiftisøkinum

STEFAN Í SKORINI

Fjarskiftiseftirlitið fer tí í næstum at lýsa við, at møguleiki er hjá áhugaðum at søkja um loyvi til at seta upp og reka fartelefonikervi og tænastur eftir nærri reglugerð.

Krøv verða sett um neyðugan fíggjarligan og tøkniligan førleika fyri at tryggja eina góða tænastu.

Fjarskiftiseftirlitið fer at standa fyri viðgerðini av umsóknum og ger síðani tilmæli til landsstýrismannin við samskiftismálum.

Í tíðindaskrivinum frá Vinnumálastýrinum verður boðað frá, at dyrnan eru opnar fyri umsóknum. Tær umsóknirnar, ið lúka treytirnar, fáa loyvi.

Fjarskiftislógin frá 1997 leggur upp til, at fræls kapping verður á fjarskiftisøkinum. Kappingin skal tryggja teir bestu og bíligastu karmarnar hjá brúkarunum. Hetta verður nú sett í verk.

- Tann meiri varandi og ynskiliga loysnin fyri menningina av fjarskifti er at fáa kapping eisini innan tað økið, verður sagt í tíðindaskrivinum.

SPILDURNÝGGJAR FLØGUR Í 3-ARANUM



- er komin

- kemur 2. okt.

- er komin

- kemur 18. okt.

Nýggjasta fløgan hjá avstralsku **Kylie Minogue** kr. 159,-

Kid A frá frálíka bólkinum **RADIOHEAD** kr. 159,-

Secrets v/Tim Christensen, fyrrverandi sangarin í Dizzy Mizz Lizzy kr. 159,-

Payback Time við **DJ Alligator** kr. 159,-

- altíð fyrst við tí nýggjasta tónleikinum...

3arin

SMS · Tel. 353535 · Fax 353536 · E-mail: tryarin@post.olivant.fo